# Ordrafremjingarpolitikkur

**Virðisbrævaordrar**
Tá Betri Banki avgreiðir tín virðisbrævaordra, verður hetta altíð gjørt samsvarandi ordrafremjingar-politikkinum hjá Betri Banka, um ikki annað er avtalað við teg.

**Ordrafremjing**
Tá Betri Banki avgreiðir virðisbrævaordrar, verður altíð roynt at fáa tað eftir umstøðunum besta úrslitið fyri teg. Atlit verður her tikið til prís, kostnað, skjóta avgreiðslutíð, fremjingar- og avrokningarlíkindi, umframt onnur viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri avgreiðsluna av ordranum sambært hugtakinum ”Best Execution”.

**Serlig boð frá tær sum kunda**
Tá tú sum kundi gevur serlig boð um ein ordra, eru tað altíð hesi boð, sum eru galdandi fyri ordran. Avgreiðsla av ordranum eftir tínum boðum kann tó hava við sær, at Betri Banki ikki kann lúka skylduna um ”Best Execution”.

**Viðurskifti, sum hava týdning, í sambandi við "Best Execution"**
Fyri at røkka ”Best Execution” verður atlit tikið til øll viðurskifti, sum gera Betri Banka føran fyri at veita tær best møguliga úrslitið viðvíkjandi samlaðu gjøldunum. Samlaðu gjøldini eru samansett av prísinum á fíggjarliga amboðnum umframt øllum útreiðslum, sum eru beinleiðis knýttar at avgreiðsluni av ordranum. Viðurskifti so sum skjótleiki, líkindi fyri at kunna avgreiða ordran, ordrastødd, ordraslag, marknaðarárin og aðrir handilskostnaðir fáa bara fyrimunarstøðu mótvegis beinleiðis prísinum og beinleiðis útreiðslunum, tá tey medvirka til at røkka best møguliga úrslitinum, við atliti samlaða kostnaðin.

**Handilsstøð**
Tá ordrar verða avgreiddir sambært hesum ordrafremjingarpolitikki, brúkar Betri Banki eina røð av handilsstøðum, sum gera Betri Banka føran fyri at røkka best møguliga úrslitinum við avgreiðslu av ordranum. Yvirlit yvir týdningarmiklastu samstarvs-felagarnar/handilsstøðini hjá Betri Banka er tøkt á heimasíðu bankans.

**Handil uttan um ein reguleraðan marknað ella MHF**
Fyri at røkka ”Best Execution” kann Betri Banki velja at avgreiða tín ordra uttan um ein reguleraðan marknað/MHF (Multilateral Handels Facilitet). Tá tú góðtekur henda ordrafremjingarpolitikk, góðtekur tú samstundis, at Betri Banki kann avgreiða tínar ordrar uttan um ein reguleraðan marknað/MHF.

**"Execution only"**
Tú kanst handla hesi virðisbrøv, uttan at vit veita tær ráðgeving um íløguna, og uttan at vit meta, um tænastan ella veitingin er gagnlig fyri teg:

• partabrøv, sum kunnu handlast á Nasdaq OMX Keypmannahavn, ella einum samsvarandi reglueraðum marknaði í Danmark, í ES, í londum, sum ES hava gjørt avtalu við á fíggjarliga økinum ella samsvarandi marknaðum í triðjalondum
• statslánsbrøv, realkredittlánsbrøv, statsskuldarprógv og onnur skuldaramboð, sum ikki fevna um avleidd amboð
• partar í donskum íløgufeløgum ella samsvarandi íløgustovnum, sum eru fevndir av ES fyriskipan 85/611/EØS

Um tú gevur serlig boð viðvíkjandi hesum virðisbrøvum, hevur Betri Banki skyldu til at avgreiða ordran sambært boðunum frá tær. Betri Banki skal tí ikki meta, um tænastan ella veitingin er gagnlig fyri teg.

**Endurmeting av ordrafremjingarpolitikkinum**
Eina ferð um árið metir Betri Banki, um ordrafremjingarpolitikkurin virkar eftir ætlan, og tillagingar verða gjørdar eftir tørvi. Samstundis metir Betri Banki regluliga, um samstarvsfelagar/handilsstøð, ið eru partur av hesum ordrafremjingarpolitikki. Á hendan hátt verður tryggjað, at Betri Banki framvegis er førur fyri at veita tær bestu møguligu tænastuna og tryggja tær best møguliga úrslitið. Tú fært ikki serliga fráboðan um broytingar í ordrafremjingarpolitikkinum. Tí verður mælt til, at tú regluliga kunnar teg um møguligar broytingar á heimasíðu bankans. Broytingar og dagføringar eru galdandi frá og við tí degi, tá hesar eru almannakunngjørdar á heimasíðu bankans.